TILTØK

Gudstænastur
3. sunnudag e. trettanda
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk. (Talvan gongur fyri KFUK í Havn).
Argir: kl. 11,
Kirkjubøur: kl. 12.30, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri KFUK í Havn
Vestmanna: kl. 12, Inga Poulsen Dam. Vestmanna kirkjukór luttekur
Sandavágur: kl. 12, altarg., David Johannesen
Kollafjørður: kl. 12, altarg., Marjun Bæk
Hvalvík: kl. 12 altarg., Mogens T. Christensen
Selatrað: kl. 12, altarg., Jógvan Friðriksson
Norðskála: kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
Norðskála: kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kikjukaffi aftaná
Glyvrar: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Leirvík: kl. 12, altarg., Uni Næs
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10,
Árnafjørður: kl. 12, (sjónvarpsgudstænasta,)
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Hvalba: kl. 12 altarg., Jónsvein Bech
Sandvík: kl. 12, Ólavur Rasmussen
Sumba: kl. 12, Patrick de Neergaard
Húsavík: kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
Svínoy: altarg., Elsa Funding

Frelsunarherurin, Tórsgøta
Vikuskiftis fundirnir við vitjan úr Suðuroy byrja í kvøld kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 20 Fundur við drekkamunni aftaná.
Sunnudagin kl. 11 Fundur, kl. 14 Sunnudagsskúli. Fundur kl. 18. Øll eru vælkomin.
Mánadag skótafundur kl. 17 og 19.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum og kl. 18 Møti.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. www.hebron.fo

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
Týsdagin kl. 17 Fritíðararbeiði, kl. 20 Sangvenjing.
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hískvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

Lívdin í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar John í Skemmuni um evnið: »Fría frelsan«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Morten Person, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja við biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Tú ert vælkomin at koma við bønarevnum skrivliga, ið verða løgd framman fyri tað Heilaga Sakramenti. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti. Evnið: Frá myrkri til ljós 1. partur. Talari: Sam Jakobsen, kl. 11.50 Barnaguðstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið í Havn 25. jan. til 1. feb. er Missiónsvika:
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli/Familjumøti, Barnakórið í Libanon í Sørvági syngur. Kl. 18 Møti við Tom Skaale, Streingjakórið í Sørvági syngur.
Mánadagin kl. 20 Møti við Bergur D. Joensen, Kristiliga Sangkórið syngur.
Týsdagin kl. 20 Møti við Jóhs. M. Olsen. Argjakórið syngur.
Mikudagin kl. 20 Møti við Alfred Petersen, Meinigheitskórið syngur.

Samkoman Rhema
Fríggjakvøldið verður onki JC Teens.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

KFUM og KFUK í Havn
Leygardagin kl. 19 í KFUK: Varðmenn hava fest.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Eilif Samuelsen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11 við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.

Meinigheitshúsið, Sandavágur
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20.00 við Bergur Debes Joensen og kl. 22.30 Ungdómsløta.
Í morgin kl. 14.30 Familjusunnudagsskúli við Jonu Thomsen, kl. 18 Møti við Torleif Johannesen.

Missiónshúsið í Hvalvík
Missiónsvika verður frá mikukvøldinum 21. januar til sunnudagin 25. januar.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Margeir Toftegaard, Fuglafjørð. Taborkórið syngur.
Innsavnan til húsið.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altarg., Mogens T. Christensen, prestur, kl. 15 Familjumøti við luttøku úr Sørvági, kl. 18 Møti við Martin R. Jacobsen, presti og Mariu Fuglø. Thomas Dam og Petur Hansen syngja.
Innsavnan til H.M.
Hálvan tíma áðrenn hvørt møti verður bønarløta.
Drekkamuður verður hvørt kvøld.

Tjørnuvík
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 16 verða serstøk møti í bygdarhúsinum. Fyriskiparar eru: Elbjørg Johannesen, Klaksvík, Hildigarð Jacobsen og Haldis Lisberg, Tvøroyri, Eyðun Christiansen, Vágur, Signheðin og Monza Olsen, Tvøroyri og Svenning av Lofti, Tórshavn. Hesi hava øll røtur sínar í Tjørnuvík.

Tabor, Toftir
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Evnið verður »Heilagi Andin og vit« v/ Pól Johannes. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nebo, Toftir
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og læra og samstundis sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti sum tey ungu skipa fyri.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor. Farið verður á møti í Leirvík kl. 19, har missiónsvika er. Koyrt verður frá Thabor kl. 18.30.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Elim í Søldarfirði
Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 Møti og sunnukvøldið kl. 18. Poul Færø og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Missiónsvika í Leirvík
Leygardagin kl. 10 Bíbliutími v/ Jørmund Foldbo, Leirvík.
Evnið: At byggja brýr, kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20 Møti v/ Hans Kristian Johannesen, Skáli. Gleði syngur.
Sunnudagin kl. 13 Gudstænasta við altarg., Uni Næs prestur, kl. 15 Sunnudagsskúli v/ Annelisu Berthelsen, Strendur. Barnakór syngur, kl. 18.30 Bønarmøti, kl. 19 Møti v/ Regin Høgnesen, Leirvík. Thaborkórið syngur.
Innsavnan til Missiónshúsið. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri.

PRÓGV

Niels Madsen í Kollafirði hevur á Aalborg Universiteti lokið prógv sum cand. mag. í samfelagsfrøði og heimsspeki.

60 ÁR

9. februar verður Anna á Dul Mørkøre, 60 ár. Dagurin verður hildin í Pálsstovu, leygardagin 31. januar kl. 12.00-17.00. Øll eru vælkomin.

BRÚDLEYP

12. juni giftast Hallgerð Poulsen og Brian Bjartalið. Vígslan verður kl. 13 í Kristnastovu, Birmavej 36, 2300 København S. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, biðjast vinarliga ringja á tlf. +45 21912901 eftir kl. 18 innan 1. mai 2004. Veitslan verður kl. 18 í Moltkes Palæ, Dronningenstværgade 2.

SILVURBRÚDLEYP

Tann 16. februar hava hjúnini Julianna og Davis Didriksen verið gift í 25 ár. Sama dag verður Julianna 75 ár. Dagurin verður hildin 14. februar í Pálsstovu. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, kunnu ringja tlf. 312552 ella 508870 áðrenn 7. februar.

GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 30. januar hava hjúnini Nelly og Petur Olsen (Piddi), Saltangará, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við atkoma, verða vinarliga biðin um at siga frá helst, áðrenn sunnudagin 25. januar á tlf. 448793 ella 226095.

Dupultgullbrúdleyp
8. februar hava Louisa og Kristian Olsen, Gjógv og 27. februar hava Alma og Jóhan Tauser, Tórshavn verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 14. februar kl. 19.00 í Badmintonhøllini. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarpørini við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317478/ 318043/ 327461/ ella 311403 eftir kl. 18.00 innan 3. februar.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 24. januar Gøta tlf. 44 10 86
Sunnudagin 25. januar Fuglafjørður tlf. 44 40 38

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Luk. 17, 10b: Vit eru ónýtir tænarar; vit hava eina gjørt tað, sum var skylda okkara at gera.

Apostlarnir biðja Harran geva sær meira trúgv; men hann vísir bøn teirra frá sær: »Um tit høvdu trúgv sum eitt sinopskorn, tá kundu tit sagt við hetta morberjatræið: 'Slít teg upp við rót og set teg niður í havið,' og tað hevði verið tykkum lýðið.« Í Guðs ríki er tað sostatt ikki ein spurningur um at hava nógva trúgv, um at ynskja sær meira trúgv. Ein trúgv, ið er til støddar sum minsta frækornið á jørð, er nóg mikið. Einki er henni óført.

Men hvat so, um Jesus ikki vil geva apostlunum meira trúgv? Hvat vil hann so geva teimum? Hvussu kann hann tá styrkja teirra trúgv?

Harrin heldur fram við einum lítlum líknilsi. Hevur tú ein húskall, sum pløgir ella røktar seyð, so setir tú hann ikki til háborðs, tá ið hann kemur heim. Tú biður hann gera matin til og borðreiða fyri tær, og síðani kann hann fáa sær sjálvur. Tað er jú tað, hann er settur til. Tað er hansara skylda. Tú fert ikki og takkar honum fyri, at hann gjørdi tað, sum honum var álagt.

Tá ið talan er um trúgv í Guðs ríki, so verður ikki spurt, um henda trúgvin er lítil ella stór. Heldur verður spurt, um henda trúgvin kemur til sjóndar í kærleika og trúskapi. Apostlarnir bóðu: »Gev okkum meira trúgv,« men Jesus vendir bønini við: »Tit eiga heldur at biðja: Lær okkum at vísa tær trúskap og at vera tær trúgv!«

Ger tað sindrið, tú kanst,
minst til, at tað er so:
Guð hjá øllum bert trúskap vil sjá.
Glaður ver, um tú bert eini neyðarslig boð,
tí hann sjálvur við hjálp er tær hjá.
O, tann gleði tann dag, Jesus man siga tær:
Tað, tú gjørdi, var gjørt móti mær!

Jákup Reinert Hansen, prestur

Nýggjan bát til várútróðurin ?

Four Ports

45 x 14 fót
Árg. 2003
Motorur: 315 HK Cummins
Báturin er sum nýggjur
Ferð: 19,5 míl

Kr. 900.000,-

Hustler

45 x 14 fót
Árg. 2003
Motorur: 430 HK Caterpillar
Báturin er sum nýggjur
Ferð: 21 míl

Kr. 1.145.000,-

Provincial

42 x 13 fót
Árg. 1992
Motorur: 350 HK Cummings (2002)
Báturin er í góðum standi
Ferð: 20 míl

Kr. 550.000,-

Miramichi XL

45 x 14 fót
Árg. 2002
Motorur: 580 HK Cummins
Báturin er sum nýggjur
Ferð: 24 míl

Kr. 1.015.000,-

Bátarnir eru útgjørdir við tólum av kendum merkjum, og hava allir hydraulikk umborð. Leveringstíð uml. 14 dagar

Sp/f Bósdalafossur • tel 333101 • fartel 253701 og 286414 • www.bosdalafossur.fo

TILTØK

KFUM og K, Klaksvík
Friggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hískvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kristoffur Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Getsemane, Klaksvík
Friggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti við André Matras.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Húsavík.
Mánadagin kl. 17 Barnarbeiði 1.-6. fl., kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri.
Vikuskifti 30.1. til 1.2 verður bíbliuskeið v/ Hans Eiler Hammer, presti, Evnið: Andans Náðigávur.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta, kl. 20 Mannsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hvalba.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, onki møti kl. 18 vegna luttøku á vikuskiftismøtum í Havn.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Bygdarhúsið í Lopra
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 19. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 10.15-12 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagur 20. januar
kl. 10-11.30 Sangur. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Málprát. Jóhan H. W. Poulsen
Mikudagur 21. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 15 Túrur (sjá skránna í bløðunum)
kl. 17-21 Opið hús
Hósdagur 22. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagur 23. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – Gongutúrur
Sunnudagin 25. januar verður gongutúrur: Vatnbrunnurin í Villingadali og Fransatoftir. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Lættur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 26. januar
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
Týsdagin 27. januar
Drekkamuður.
Ítriv fyri áhugað.
Mikudagin 28. januar
Drekkamuður.
Jóna Dahl greiðir frá umhvørvisvinarligari reingerð (Biosol)
Hósdagin 29. januar
Drekkamuður. Prát og sangur
Fríggjadagin 30. januar
Børn úr dagrøktini (skúlabólkurin) koma at syngja fyri okkum.

Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mánadagin 26. januar
Vit spæla landastrok. Eisini tosa vit nærri um túrin til Norðoya í summar.
Mikudagin 28. januar
Upplestur

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirksifelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.
Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.